Kurt skoraði

Noreg: Men føroyski málskjúttin er ikki nøgdur við úrslitini í fyrstu trimum dystunum í ár

EYÐUN KLAKSTEIN

Kurt Mørkøre skoraði fyri felag sítt, Sogndal, tá liðið spældi á heimavølli móti Skeid.

Men tað rakk ikki meira enn til javnleik hjá Sogndal, sum eitt skifti var á odda til 2-0. Kurt Mørkøre skoraði málið til 2-0 í fyrra hálvleiki.

Í seinna hálvleiki var Skeid á odda 3-2, men Sogndal javnaði til 3-3. Julian Johnsson og Kurt Mørkøre spældu báðir allan dystin fyri Sogndal, og Julian gjørdi brotsspark, sum hevði við sær eitt av málunum hjá Skeid.

Trý umfør eru nú spæld av norsku kappingini, Sogndal hevur spælt tveir dystir javnar og tapt ein, og tað eru teir í Sogndal ikki nøgdir við.

– Vit hava fingið ein trupulleika við deyðbóltum, tí øll málini, sum eru gjørd ímóti okkum í ár, eru komin eftir deyðbóltar, sigur Kurt Mørkøre.

Nógv kann hendan

Hann heldur, at enn er ov tíðliga at avskriva Sogndal í kappingini um uppflytingarplássini, hóast liðið ikki er komið væl frá byrjan.

– Enn eru bara tríggir dystir spældir, og tað kann framvegis henda nógv í kappingini, sigur hann.

Sogndal hevur sum mál at flyta upp í bestu norsku deildina, og teir halda seg vera væl fyri við fólki í løtuni. Álopið meta teir sum teirra besta í fleiri ár, og tað er serliga takka veri Kurt Mørkøre, sum teir halda hevur styrkt álopspartin munandi. Í teimum 15 venjingardystunum undan kappingini, skoraði Kurt 10 mál.

Julian Johnsson eigur fast pláss á miðvøllinum hjá Sogndal, har hann, sum honum líkt, ger eitt stórt arbeiði.

Hillerød vann

Eftir heldur laka úrtøku seinastu tíðina, bragdaði aftur hjá føroysku kvinnunum í donsku elite-seriuni

Felagið hjá Helgu Ellingsgaard og Eyðvør úr Dímun, Hillerød, vann dystin í bestu donsku kvinnudeildini um vikuskiftið.

Hillerød spældi í Odense móti OB, sum er oddafiskur í deildini, og har gjørdu Hela, Eyðvør og hinar á liðnum hjá Hillerød ikki matari, enn at tær vunnu trupla útidystin 3-2.

Hvørgin av føroysku spælarunum var millum málskjúttarnar hesaferð.

Hillerød liggur sum nummar fýra í elitudeildini hjá kvinnum. Sjey lið eru í deildini, men Hillerød hevur 10 stig upp til nummar 1, meðan heili 34 stig eru niður til botnliðið úr Vorup.

Hillerød hevur seks dystir eftir at spæla í hesum kappingarárinum.

EK

Jákup aftur á toppinum

Superligan: *Herfølge vann tryggan sigur sunnudagin, og so gav FCK eisini Herfølge eina hjálpandi hond í oddastríðnum*

Sum úrslitini lagaðu seg um vikuskiftið, kunnu Jákup og liðfelagarnir í Herfølge aftur smílast

EYÐUN KLAKSTEIN

Herfølge gjørdi bart, tá teir sunnudagin spældu ímóti Lyngby í superliguni.

Dysturin, sum var spældur á heimavøllinum hjá Herfølge, endaði við trygguum heimasigri.

Herfølge kom beinanvegin á odda 1-0, og teir vunnu dystin 4-1. Jákup Mikkelsen stóð sum vant í málinum hjá Herfølge.

Samstundis sum Herfølge aftur vann, varð Brøndby eyðmýkt í Esbjerg, har teir spældu móti klárt aftasta liðnum í deildini. Men hóast Esbjerg líkist einum sólarklárum niðurflytarar, vunnu teir dystin móti oddaliðnum 2-0. Danska pressan tosaði í gjár um eina sensatión, tá talan var um hendan dystin.

Hesi úrslit gera, at Herfølge nú aftur hevur tikið seg eitt stig fram um Brøndby, og Herfølge er nú nummar 1 í superliguni. Úrslitið móti móti Lyngby er tað besta hjá Jákup og teimum eftir vetrarsteðgin. Liðið hevur havt trupulleikar við at gera mál, men sunnudagin gekk avbera væl við hesum.

Sagt verður, at Herfølge spældi sera væl, og at sigurin var fult uppiborin.

Todi og teir hjálptu

FC Keypmannahavn gav Herfølge eina hjálpandi hond, tá felagið hjá Toda Jónsson spældi javnleik, 0-0, móti AaB í Ítróttarparkini.

AaB kundi tikið fyrsta plássið í superliguni, um teir vunnu dystin, men nú eru teir nummar 3 í kappingini.

Todi Jónsson varð settur á beinkin til dystin, tí FCK-venjarin vildi royna amerikumannin, Will Orbin, frá byrjan í dystinum. Todi kom á vøllin fimm minuttir eftir hálvleiksstaðgin. Hann kláraði tó ikki at gera nakað við málturkin í Parkini í dag, hóast hann var nær við í tí einu støðuni.

Dysturin millum FCK og AaB var linligur, hóast umstøðurnar til ein góðan dyst vóru til staðar. Veðrið var gott, vøllurin góður og hýrurin á áskoðaraplássunum sera góður.

AaB, sum hevur strítt seg framaftur í oddan, eftir at teir hava ligið nakað aftanfyri Herfølge og hini liðini, tók ikki oddasessin í hesu syftini.

Hinir dystirnir

AGF, sum Óli Johannesen hevur sáttmála við, tapti stórt, tá teir vóru í Odense og spældu móti OB.

Søren Andersen, sum er úr Árhus, men nú er álopsmaður hjá OB, segði áðrenn dystin, at vónaði ikki, at AGF fór at flyta niður. Men hann gjørdi sanniliga sítt til, at felagið úr Árhus helt um botnstøðuna. Søren Andersen skoraði trý tey fyrstu málini hjá OB í 4-0 sigrinum.

Á heimavølli fekk AB, sum herfyri gav venjaranum, Ole Mørch, sekkin, javnleik móti Vejle. Dysturin endaði 1-1.

Og Silkeborg hongur í oddafeløgunum. Sunnudagin vunun teir ein tepran 1-0 sigur á Viborg.

Spælt verður aftur í superliguni longu mikukvøldið. Tá skal Herfølge spæla í Vejle, meðan FCK spælir í Viborg. Spælt verður eisini næsta sunnudag.

Úrslitini um vikuskiftið

AB-Vejle 1-1
Silkeborg-Viborg 1-0
FCK-AaB 0-0
Esbjerg-Brøndby 2-0
OB-AGF 4-0
Herfølge-Lyngby 4-1

Komandi dystir:

10.05 AGF-Silkeborg
10.05 Aab-AB
10.05 Brøndby-OB
10.05 Vejle-Herfølge
10.05 Viborg-FC København

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 Herfølge	28	14	-	5	-	9	43	43	0	47
2 Brøndby	28	13	-	7	-	8	51	32	19	46
3 AaB	28	11	-	12	-	5	47	28	19	45
4 Silkeborg	28	12	-	7	-	9	43	29	14	43
5 Viborg	28	12	-	6	-	10	41	41	0	42
6 FCK	29	12	-	5	-	12	40	32	8	41
7 Lyngby	28	12	-	4	-	12	42	45	-3	40
8 AB	28	10	-	9	-	9	38	33	5	39
9 OB	28	9	-	9	-	10	32	35	-3	36
10 AGF	29	8	-	7	-	14	31	47	-16	31
11 Vejle	28	6	-	11	-	11	35	54	-19	29
12 Esbjerg	28	7	-	4	-	17	31	55	-24	25

Landsliðið sent til hús

Hondbóltur: Meginparturin av U-20 landsliðnum hava fingið at vita, at teir ikki kunnu luttaka í arbeiðnum hjá HSF komandi fýra mánaðirnar

mánadagur, 1. mai 2000

[redacted]

Viðvíkjandi leikbanni

Tað harmar okkum at boða frá, at starvsnevndin í Hondbóltsambandi Føroya í dag hevur avgjørt, at geva tær leikbann (karantenu) á U20 landsliðnum til 1. august 2000.

Avgerðin er tikin, eftir at vit hava hoyrt einsljóðandi frágreiðingar frá øllum venjarum, hjálparvenjarum og liðleiðarum á túrinum til Fredrikshavn.

Greitt er, at tú hevur brotið reglurnar um ikki at drekka rúsdrekka. HSF hevur sostatt verið noytt at viðgera og taka støðu til avleiðingarnar. Hetta var tú kunnaður um skrivliga áðrenn túrin.

Reglur fyri spælarar á ungdómslandsliðum, sum eru við á ferðum hjá HSF.

1. *Allar avtalur og klokkutíðir skulu haldast.*
2. *Spælarar eiga at vísa sømiligan ítróttaranda og atburð bæði á og uttanfyri vøllin, tí tey umboða HSF og Føroyar.*
3. ***Tað er ikki loyvt at drekka rúsdrekka á ferðini.***

Leiðarar og venjarar hava fyri HSF ábyrgd av, at reglurnar verða hildnar.

Brot á reglurnar kunnu hava tær fylgjur, at spælarin fær karantenu ein ella fleiri dystir.

Um spælari drekkur rúsdrekka, kann viðkomandi sendast beinleiðis heim fyri egna rokning. Leiðarar og venjarar gera av, um spælari skal sendast heim.

Vit vænta tó, at tú fer at halda fram at íðka hondbólt, so at tú aftur fært møguleika at gera teg galdandi á úrvalsliðum hjá HSF.

Vegna HSF

Petur Ove Petersen
Formaður

Thurid Samró

Kári Mortensen

Brævið frá HSF, sum meginparturin av leikarunum fingu frá frá HSF, stutt eftir heimkomuna úr Danmark

JÁKUP MØRK

Tá U-20 landsliðsleikararnir á vegnum heim frá kapping í Danmark feirað bronsumerkini, sum teir høvdu vunnið, grunaðu teir helst ikki, at veistluhýrurin skuldi kosta teimum landsliðssessin komandi tíðina.

Fyri stuttum fingu teir tó bræv frá hondbóltssambandinum, har sagt varð frá, at teir ikki kunnu luttaka í nøkrum aktivitetum hjá HSF fram til 1. august.

Orsøkin til uppsøgnina sigst vera, at leikararnir hava brotið eina greiða avtalu, sum teir undan ferðini høvdu gjørt við HSF.

Einki val

Formaðurin í Hondbóltssambandinum sigur við Sosialin, at hetta sjálvandi er eitt keðiligt stig at taka, men at teir í verandi støðu kendu seg noyddar til hetta.

- Við støði í danmarkarferðini hjá liðnum, halda vit okkum ikki hava nóg stórt álit á leikarunum, og tí meta vit ikki, at vit kunnu senda teir at umboða Føroyar í komandi EM-undanspælinum, sum verður í Hvítarusslandi.

Víðari greiðir Petur Ove frá, at teir valdu at taka hetta stigið, eftir at hava tosað við fleiri av hjálparfólkunum, sum vóru við á ferðini.

Sjálvur harmast Petur Ove um, at teir á henda hátt hava banna einum sera evnaríkum liði atgongd til slíka kapping, men í hansara verð hevði HSF einki val.

- Leikararnir fingu greitt at vita, at ósømiligur atburður á ferðini fekk fylgjur, og eisini fingu teir at vita, at ein møgulig fylgja kundi verða heimsendan, enntá upp á egna rokning.

Hvørt tað kann vera ein uggi fyri nakran av bannaðu leikarunum, skal ikki sigast her, men Petur Ove sigur, at orsøkin til at bannið er galdandi til júst 1. august er, at hetta er um sama mundi, sum A-landsliðið fer undir venjingar sína.

- Sostatt hava vit latið eina hurð staði á glopp, til tess at leikarar, sum møguliga kunnu vera við á hesum, ikki eisini missa hendan møguleika.

Skert landslið

Føroyar verða tó umboðaðar í EM-undankappingini, men tað verður við einum rættuliga skerdum liði.

Í stóran mun verður talan um leikarar, sum hava mannað U-18 landsliðið, sum eisini var við á venjingarleguni í Danmark, har teir endaðu á fjórða plássinum, eftir at hava tapt bronsudystin móti U-20 liðnum.

Hóast góða úrslitið í Danmark, so skerst ikki burtur, at liðið, sum nú verður sent avstað, als ikki hevur somu royndir, sum undangongumenn teirra, og vandi er tí eisini fyri, at teir fáa nøkur ítróttarlig sár, sum kunnu taka sína tíð at lekjast. U-20 liðið var í stóran mun mannað av leikarum, sum í vetur hava verið fastir fúsir í bestu mansdeildini, og uttan at taka nakað frá yngru leikarunum, kann staðfestast, at munur er á bestu og næst- ella triðbestu hondbóltsdeildini her heima.

Hesum er hondbóltsbossurin tó ikki so bangin fyri. Hann sigur at tað sjálvsagt verður torføt at fáa líkinda úrslit móti tjóðum sum Frakland og Hvítarusslandi, men her gamla liðið helst eisini fingið sera truplar dystir. Hann greiðir annars frá, at fíggjarligar avleiðingar kundu staðist av, um Føroyar tók luttøku sína aftur, og harumframt hevði talan møguliga eisini verið um bann til komandi kapping.

At enda endurtók Petur Ove, at hann var ómetaliga harmur um støðuna, men legði samstundis áherslu á, at teir kendu hetta sum eitt neyðugt stig.

- Talan er um leikarar, sum møguliga skulu umboða Føroyar á hægsta støði, og tímugu teir læra, at tað fylgja nakrar treytir við hesum. Tá treytirnar ikki verða hildnar, mugu teir so eisini taka avleiðingarnar av hesum. Eisini fyri at vísa yvir fyri øðrum landsliðsleikarum, at slíkur atburður als ikki verður góðtikin. sigur Petur Ove Petersen at enda.

Ikki hoyrdir

Frá leikarunum sjálvum er viðmerkingin, at teir eru ómetaliga vónbrotnir av framferini hjá HSF í málinum.

Ein av teimum, sum vit hava tosað við, sigur, at talan als ikki var um at menn gjørdi sær fyri skommum á ferðini.

Eftir at kappingin var lokin, hildu leikararnir seg kunna stuttleika sær eitt sindur, og var hetta eisini gjørt, men nakra veitslu var talan ongantíð um, frættist frá teimum. Talan var um nakrar leikarar, sum hugnaðu sær við nøkrum ølum, so talan var ikki um nakað rok ella óskil á nakran hátt, eru orðini frá leikarunum.

- Tað keðiligasta er eftir mínum tykki, at Hondbóltssambandi als ikki hevur sett seg í samband við okkum, fyri at fáa okkara útlegging av málinum, sigur ein av leikarunum við okkum.

- Vit vistu ikki um nakað sum helst, áðrenn bræv kom frá hondbóltssambandinum, har sagt varð frá, at vit í fram til 1. august vórðu útilokaðir frá øllum landsliðsarbeiði undir HSF, sigur vónbrotni leikarin. Harumframt vísur hann á, at honum kunnugt hevur hann ongantíð fingið nakað skriv frá HSF um, hvørjar treytir vóru galdandi til túrin, soleiðis sum tað framgongur av skrivinum her á síðuni. Sostatt er eingin, sum noktar fyri, at treytirnar í skrivinum ikki eru hildnar, men hinvegin vísa teir á, at teir ikki hava fingið upplýst hesar treytir undan ferðini.

Víðari greiðir hann frá, at allir leikararnir hava vant sera hart til hesa kapping, og at teir allir sum ein høvdu sæð fram til EM-undankappingina. Eitt nú høvdu teir vant tríggjar ferð um dagin, nú teir vóru í Danmark.

Nú tykist øll henda venjing at vera nyttuleys, og hetta er sjálvandi ein keðilig støða hjá avsettu leikarunum at vera í.

Víðari sigur leikarin, at tá teir í fjør fingu góð úrslit í Luxemburg, vóru tað umboðini hjá HSF, sum skipaðu fyri veitstlu fyri leikarunum, men nú teir sjálvir gjørdu av at hugna sær eitt sindur, fall stóri hamarin, ella øksin um man vil, alt fyri eitt.

Hondbólturin varð taparin

Prísurin teir noyddust at rinda varð høgur, men fyri framtíðina hjá føroyskum hondbólti er bert at vóna, at hetta ikki hevur tikið mótið frá leikarunum. Einki er at ivast í, at fleiri teirra eiga eina stóra framtíð í føroyskum hondbóltshøpi, og talan verður um eitt risa afturstig, um so er at nakrir teirra velja at leggja hondbóltin til viks orsakað av hendingini.

Sostatt er líkt til, at føroyski hondbólturin gerst stóri taparin í málinum, tí fleiri av okkara evnaríkastu ungu leikarum missa møguleikan at fáa dýrabarar royndir í altjóða kapping.

Endaliga úttøkan av nýggja landsliðshópinum (U-18) var í gjárkvøldi eftir at blaðið fór til prentingar.